www.sf.fo

NORÐOYA SPARIKASSI

# TAKK FYRI HESAFERÐ




**TAKK** til allar bólkar og tónleikarar. Tey, sum av hjartans huga framførdu á festivalinum - og ta stóru fjøld, sum l ddi á, sang við og hugnaði sær á økinum.

**TAKK** til pallsmiðir og tøkningar. Takk til eftirlitsfólk, vaktarfólk, sjúkrahús, samarittar og løgregluna.

**TAKK** til hjálparlið og ábyrgdarfólk, sum altíð eru tilreiðar, tá ið á stendur. Arbeiðsfólk, ruddarar og onnur skilafólk, sum eru drúgv í sínum gerningi og altíð royna at gera sítt besta.

**TAKK** til Klaksvíkar B ráð og Kunningarstovuna fyri mennandi samstarv og viljan at hugsa frameftir og lyfta í felag.

**TAKK** til allar ónevndar og ókendar vertir og veitarar, familjur og húseigarar, sum lótu allar dyr á víðan vegg fyri festivalgestum við góðvilja og hjartarúmi.

**TAKK** til okkara drúgvu stuðlar og sponsorar, sum hava lagt lunnar til ein livandi og fólksligan festival.

**TAKK** til allar festivalgestir. Fyri samhuga, smíl og blíð orð á vegnum. Takk fyri eitt minniligt vikuskifti, har øll sungu við og kærleikin blómaði!

**TAKK FYRI TÓNLEIKIN!**

**Vit hittast aftur á Summarfestivali 4. - 6. august 2011**

Summar FESTIVALUR – HAR HITTINI HITTAST

Posta KBI TRYGD FØROYATELE ATLANTIC AIRWAYS NORÐHÚS Sosialurin Föroya Bjór